# UEFA trýr ikki B71 vann á HB




Eingin ivi er um, at úrslitið í Gundadali skírisdag verður millum mest óvæntaðu úrslitini í hesum kappingarárinum. Í Sandoy siga tey, at har eru tey komin víðari og hava lagt sigurin aftur um bak, men á heimasíðuni hjá B71 stuttleika tey sær framvegis við sigrinum. Har verður víst til heimasíðuna hjá UEFA, sum teir speiskliga leggja undir at sýta fyri at trúgva úrslitinum millum HB og B71.

– Um skribenturin á heimasíðuni hevur noktað fyri at trúgva upplýsingunum úr Føroyum, ella talan bert er um ein lítlan skrivifeil, skulu vit ikki gera okkum klók upp á, men velja tó at trúgva tí seinna. Men hvussu er og ikki stendur, at HB vann dystin 3-0, skrivar heimasíðan hjá B71.

Vit kunnu tó upplýsa, at feilurin er rættaður og at UEFA nú »trýr«, at B71 vann á HB.

# Føroyameistarar í liðkappingin í judo funnir

**Seinasta umfar av liðkappingini í judo var á Oyrarbakka beint fyri páskir. Endaliga úrslitið gjørdist, at Havnar Judofelag (HJF) vann liðkappingina hjá børnum, og Sunda Judofelag (SJF) vann kappingina hjá monnum**

**Úrslitini av dystunum seinasta umfar:**

**Børn:**

| | |
|---|---|
| SJF - HJFa | 2-3 |
| SJF – HJFb | 2-3 |
| HJFa – HJFb | 3-1 |

**Menn:**

| | |
|---|---|
| SJF – HJF | 3-0 |

**Endaliga støðan gjørdist sostatt:**

**Børn:**

| | |
|---|---|
| HJFa | 18 stig |
| HJFb | 8 stig |
| SJF | 4 stig |

**Menn:**

| | |
|---|---|
| SJF | 6 stig |
| HJF | 0 stig |



*Føroyameistararnir hjá børnum gjørdist HJFa : Frá vinstru: Fríði Atlason, Ernst D. Remmel, Pætur Jákupsson og Inga D. Remmel*



*Bronsuvinnarar hjá børnum gjørdist SJF: Frá vinstru: Carsten Joensen, Dánjal Dalbø, Alex Joensen, Maria í Kálvalíð og Pólina Kjærbæk*



*Silvurvinnarar hjá børnum gjørdist HJFb: Frá vinstru: Niels Pauli Rasmussen, Torbjørn Haraldsen og Aksel D. Remmel*



*Frá vinstru: Hjalmar Johannesen, Edvard Johannesen og Petur Sigurð Johannesen*



*HJF menn: Frá vinstru: Benny Ejdesgaard, Áki Davidsen og Hendrik Johannesen*